

# Nice to see you

VEÐURLAG
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore, er ein heilt onnur typa enn tann politiski leiðarin, hann arbeiddi undir frá 1992 til 2000, nevnliga Bill Clinton. Síðstnevndi er munandi meiri fólksligur, enn tann meiri afturhaldandi – fyri ikki at siga styggi – Al Gore, tá tað kemur til tann fólksliga partin.

Sjálvt um trygdartiltøkini vóru munandi meiri strong undir Clinton-vitjanini í oktober, so var lættari at fáa viðmerkingar frá honum, enn Al Gore.

Og tó. Sum tann fyrsti og einasti miðilin eydnast tað kortini Sosialinum at fáa nakrar heilt stuttar viðmerkingar frá Al Gore, tá hann fyrstu ferð vísti seg alment á veg út av Hotel Føroyum, har nøkur barnagarðsbørn frá Dagstovninum undir Fjalli vóru komin við amerikanskum fløggum, tey sjálvi høvdu teknað.

- Hello, nice to see you, vóru fyrstu orðini hjá Al Gore, tá hann kom út at heilsa upp á børnini.

Undirritaði: - Hvat væntar tú tær av ferðini í Føroyum?

Al Gore: - Eg síggi fram til at tosa um veðurlagskreppuna og vísa mína myndaframløgu um hetta evnið. Og eg gleði meg at vísa á møguleikar, hvussu vit kunnu loysa hesa kreppuna.

Undirritaði: - Hvat kunnu Føroyar gera fyri at gera sítt til at bøta um støðuna á hesum økinum?

Al Gore: - Minka CO2-útlátið, var stutta svarið hjá fyrrverandi varaforsetanum. Síðani setti hann seg inn í bilin, koyrdi hurðina aftur og saman við fylgi setti kósina móti Tinganesi, har hann skuldi hitta Jóannes Eidesgaard, løgmann, og landstýrisfólkini, Høgna Hoydal og Helenu Dam á Neystabø.

Klokkan 14 skuldi Al Gore halda sín fyrilestur í Norðurlandahúsinum.



*Al Gore uttan fyri Hotel Føroyar*

*Mynd: Slim Allagui*



*Gore heilsaði upp á børn frá Dagstovninum undir Fjalli*

*Mynd: Slim Allagui*




**umsiting av okkara tilfeingi, segði landsstýriskvinnan millum annað**

*Mynd: Finnur Justinussen*




## Bogi Hansen:

**Umframt eina sera lærandi frágreiðing um støðuna í Norðuratlanshavi, segði Bogi Hansen, havgranskari, at hann fegnaðist um vitjanina hjá Al Gore.**
**- Vónandi kann hetta hjálpa okkara politikarum at handla meira ábyrgdarfult í framtíðini, enn teir hava gjørt higartil**

*Mynd: Finnur Justinussen*




## Josef Motzfeldt

grønlendskur landstingslimur og fyrrverandi uttanríkismálaráðharri
Umhvørvisbroytingar sæð úr einum grønlendskum sjónarhorni

*Mynd: Finnur Justinussen*